Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo



# 70 ára føðingardagur

Í dag verður Torborg Hansen av Toftum 70 ár. Torborg er dóttir Helenu Olsen (f. Johannesen) á Lag í Hvalvík og Jens Chr. Olsen á Toftum. Helena doyði í 1937, so Torborg var einans tvey ára gomul, tá hon misti mammu sína. Helena og Jens Chr. fingu fimm børn saman. Í 1940 giftist Jens Chr. uppaftur við Hildu Olsen (f. Hansen) á Toftum, og tey fingu sjey børn saman.

Torborg vaks sostatt upp í einum heimi við stórari familju, tí umframt foreldur og systkin, búðu omman og abbin inni, og Lotta og Sofus. Hetta merkti sjálvandi, at nógv var at taka hond í, og er hetta eisini tað, sum eyðmekir Torborg. Hon hevur eitt ljóst lyndi og altíð verið sera arbeiðssom og kvik, og klár at hjálpa, har tørvur er á tí.

Sum ung tænti Torborg eitt skifti hjá Esther Djurhuus í Havn. Saman við 24 øðrum ungum føroyskum kvinnum var hon á húsarhaldsskúla í Danmark, og hon arbeiddi eisini eina tíð í Íslandi sum húshjálp hjá eini familju.

Í 1958 giftist Torborg við Debus Hansen av Nesi. Tey bygdu sær hús á Toftum og fingu 7 børn saman; seks dreingir og eina gentu: Asbjørn, Jens Christian, Høgni, Petur Hans, Heri, Øssur og Doris. Sum vanligt var, var Torborg heima hjá børnunum, meðan Debus sigldi úti sum kokkur. Torborg syrgdi fyri øllum har heima, og sá til, at børnini fingu ein tryggan og góðan uppvøkstur. Gestablíð hevur Torborg altíð verið, so húsið var ofta fult av børnum og mong fólk komu - og koma enn - á gátt.



Tá børnini vuksu til, fekk Torborg sær lønandi arbeiði. Hon hevur m.a. ansað børnum, arbeitt í fiski og verið heimahjálp. Tá "stadion" kom á Svangaskarði, fór Torborg at arbeiða í køkinum har. Hon hevur altíð duga sera væl at matgjørt, og mong eru tey, sum hava notið gott av hesum. Tað munnu vera fáir fótbóltsleikarar, sum ikki kenna Torborg. Hon hevur "tikið sær av" flestu fótbóltsfeløgum í landinum, tá hesi hava verið á Svangaskarði, umframt landsliðunum í samband við altjóða dystir og venjingarlegur. Eisini hevur Torborg matgjørt, tá brúdleyp og onnur tiltøk hava verið á Svangaskarði.

Seinnu árini hevur Torborg ikki arbeitt, men hetta merkir langt í frá, at hon situr "hendur í favn". Hon er enn sera virkin, og altíð klár at hjálpa, tá heitt verður á hana. Familjan er vorðin stór, og umframt børn og svigarbørn hevur Torborg 20 ommubørn. Børnini elska at vitja ommu og abba, og tað munnu vera fá vikuskiftir, har ikki onkur gistur hjá teimum eisini.

Børn, svigarbørn og ommubørn ynskja føðingardagsbarninum hjartaliga tillukku, og takka fyri alt hon hevur verið fyri okkum øll, við ynskjum um mong góð og eydnurík ár afturat.

Føðingardagurin verður hildin á Svangaskarði í kvøld (10 dec.) kl. 19.00, har øll eru hjartaliga vælkomin.

*Tillukku!*

## Jonna og Jógvan Jacobsen diamantbrúdleyp



Fríggjadagin 10. desember kunnu Jonna og Jógvan Jacobsen í Vestmanna halda diamantbrúdleyp.

Jógvan er ættaður úr Vestmanna, og er sonur Sonnu og Jákup Jacobsen á Fjørðinum.

Jógvan fór sum heilt ungur til skips. Í 1939 fór hann á maskinskúla og sigldi øll krígsárini, og líka til hann bleiv pensioneraður.

Jonna er ættað úr Streymnesi og er dóttir Hannu og Zacharias Zachariassen. Sum ung kom hon til Vestmmannar í læru at seyma, har í tey møttust. Jonna og Jógvan giftust í 1944, tey fingu børnini Sigbjørg, Hergerð og Jónvør. Tey eiga 7 ommu-abbabørn og 7 langommu-abbabørn.

Sjálvt um tey eru komin væl til árs, eru tey aktiv í bridge kortspæli.

Dagurin verður hildin saman við familjuni.

Góðu tit bæði, ynskt verður hjartaliga til lukku við tíð stóra degnum og Guðs signi í framtíðini.

**Familjan**




UNDIRKLÆÐIR

Stórt úrval av undirklæðum í øllum støddum í ull og bummull

bummull ← 75,-

Fáast við stroppum og stuttum ermum

Buksur við brók, og trussur

Skálabúðin


**70 ára føðingardagur**

Í dag, 10. desember verður Torborg Hansen á Toftum 70 ár.

Føðingardagurin verður hildin á Svangaskarði kl. 19.00, har øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gullbrúdleyp**

Leygardagin 11. desember hava Apolonia og Richard í Hvannasundi gullbrúdleyp.

Dagurin verður hildin saman við børnunum.

## Tøkk



Vinir, kenningar og skyldfólk, nær og fjar.
Hjartans tøkk fyri, at tykur við vitjanum, samrøðum, fjarritum, gávum, blómum og í skrift vildu gleðast saman við mær og familju míni 85 ára føðingardagin 11. september.
Gleðilig jól og gott nýggjár øll somul.

*Við vina- og frændakvøðu*
**Martin Eidesgaard, Tvøroyri**

## Tøkk

Eg vil bera eina hjartans tøkk til børn við maka, sum vóru saman við mær á 85 ára føðingardegnum 29. oktober.

Takk fyri vakran sang. Takk fyri blómur, fjarrit, kort, uppringingar og vitjanir aftaná føðingardagin

**Lillan Jacobsen**
**Klaksvík**

**Dagurin**

**10. desember. Judit.** Apokrýfiska bókin í Gamla testamenti greiðir frá konubrotinum Judit, sum høgdi høvdið av herhøvdinganum Holofernes.

Navnið er bíbilskt og merkir *jødakvinna*.

## Tøkk

Eina hjartans tøkk vilja vit bera tykkum, sum fylgdu okkara elskaðu mammu, svigarmammu, ommu og langommu

**Katrina Maria Johannesen**
**Klaksvík**

til hennara seinasta hvíldarstað.

Ein serstøk tøkk til Røktarheimið og tykkum, sum hjálptu til við jarðarferðina.

Gleðilig jól og Guds signing í komandi ári.

*Familjunnar vegna*
**Greta, Óli, Sørin og Katrina**